# Eldraráðið í Tórshavnar kommunu

Eldraráðið ráðgevur Býráðnum í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommununa.

Eldraráðið kemur við hugskotum og virkar  fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

Eldraráðið kann:

- úttala seg um eitthvørt evni, sum hevur áhuga hjá teimum gomlu
- koma við hugskotum og uppskotum
- seta spurningar til Býráðið um eldrapolitikkin og fíggjarætlanina.

Eldraráðið eigur ikki at viðgera mál viðvíkjandi ávísum persónum.

## Viðtøkur fyri Eldraráðið
## § 1 Endamál

Eldraráðið er ráðgevi hjá Býráðnum, og fær í lag samskifti millum eldru borgararnar og kommununa.

Stk. 2
Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samarbeiða við Býráðið fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynski og tørv teirra eldru.

Stk. 3
Eldraráðið skal koma við hugskotum og virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

## § 2 Heimild

Eldraráðið veitir Býráðnum ráð í eldrapolitiskum spurningum og virkar sum ein samskiftisstovnur millum borgarar og Býráðið í sambandi við tilrættaleggingina av eldrapolitikkinum.

Stk. 2
Býráðið eigur at spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur teimum eldru.

Stk. 3
Einstøku býráðsnevndirnar samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.

Stk. 4
Eldraráðið kann av sínum eintingum siga Býráðnum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar.

## § 3 Starvsháttur Eldraráðsins

Eldraráðið skal kunna seg um ynskir og tørv teirra gomlu og um kommununar viðurskifti á eldraøkinum.

Stk. 2
Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til tey eldru um broytingar og nýskapan á eldraøkinum.

Stk. 3
Eldraráðið skal halda fast um og útbyggja samskiftið vid Býráðið gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á eldraøkinum, og harvið menna og tillaga tey samsvarandi samfelagsmenningini.

Stk. 4
Eldraráðið eigur at hoyra tær staðbundnu nevndirnar (Kollafjarðar- Nólsoyarnevndina o.s.fr.) í málum á eldraøkinum.

## § 4 Eldraráðsins samanseting

Valdir verða 5 limir og 5 varalimir til Eldraráðið.

Stk. 2
Varalimirnir kunnu eisini møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt.

Stk. 3
Valskeiðið er 4 ár.

Stk. 4
Limur í Eldraráðnum kann frítakast fyri limaskap eftir áheitan. Avgerð, um limur verður frítikin, tekur Eldraráðið.

Stk. 5
Um ein limur í valskeiðnum missir valbari, doyr ella verður frítikin sambært §4, stk. 4, kemur varalimur inn í tí raðfylgju, teir eru valdir.

Stk. 6
Er eingin varalimur á varalistanum at seta ístaðin, verður eykaval í samráð við Tórshavnar kommunu.

## § 5 Val til Eldraráðið

Val til Eldraráðið er 4. hvørt ár ta fyrstu vikuna í oktober.

Stk. 2
Valbari og atkvøðurætt hava allir borgarar í kommununi, sum valdagin hava fylt 60 ár.

Stk. 3
Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skriftlig boð um hetta í seinasta lagi 4 vikur áðrenn valið verður hildið. Saman við valevnisfráboðanini eigur at fylgja undirskrift hjá minst 5 stillarum, sum lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið. Eingin kann vera stillari fyri meira enn einum valevni.

Stk. 4
Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillað.

Stk. 5
Valið skal fara fram við brævatkvøðu.

Stk. 6
Býráðið ásetir nærri reglur um valið, herundir um freistir, vallistar, atkvøðugreiðsluna, kunngerð og uppgerð av valinum, klagur um valið v.m.

## § 6 Stovnan og arbeiðsháttur

Eldraráðið skipar seg við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.

Stk. 2
Eldraráðið ásetir sjálvt fundarskrá sína, hvussu ofta fundir skulu verða, reglur fyri dagsskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátt.

Stk. 3
Dagsskrá og fundarfrásøgn skal sendast til Býráðið. Fundarfrásøgnin er almenn við virðing fyri tagnarskylduni.

Stk. 4

Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Stk. 5
Býráðið setir eina upphædd á fíggjarætlanini fyri Eldraráðsins virksemi.

Stk. 6.
Kommunan veitir skrivstovuhøli, fundarhøli og skrivarahjálp til Eldraráðið.

## § 7 Gildiskoma/Íverksetan

Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar í Býráðnum.

## § 8 Broytingar í viðtøkunum

Eldraráðið, ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til Býráðið um broytingar í viðtøkunum.

Stk. 2
Býráðið kann koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

Stk. 3
Broytingar í viðtøkunum koma í gildi, tá tær eru samtyktar í Býráðnum.

## § 9 Um at taka Eldraráðið av

Býráðið kann til eina og hvørja tíð gera av, at Eldraráðið verður tikið av. Áðrenn tílíka avgerð verður málið í góðari tíð frammanundan lagt fyri Eldraráðið til ummælis.

Stk.2
Verður Eldraráðið tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til Tórshavnar kommunu.

*Soleiðis samtykt á Býráðsfundi 15. des 2016*